# Seyðalitir og gásalitir í Øravík

## A shepherd's Colour Structure for the Identification of Sheep (and Geese)

*Dánjal Jákup Mortensen*
Úti í Garði, Øravík

Skipað tilfarið og skrivað inngangin hevur Tollakur Djurhuus

### Úrtak

Allir seyðalitirnir í "litskipanini" hjá einum seyðamanni. Áseyðurin í einum hagaparti lýstur við hesum litum (og øðrum frámerkjum) í hvørjum einstøkum føri. Haraftur-at yvirlit yvir allar gásalitirnar í bygdini.

### Abstract

The overwhelming importance sheep breeding has had in the Faroes over the centuries has resulted in the shepherds having perfected local or individual ways of identifying each and every sheep. The reason for this exact identification is due to the shepherds' interest in their stock, but also due to economic consideration. The extremely great number of sheep colours is a telling story to the interest the Faroese shepherds have had in knowing their stock intimately. Sheep colours still form an integral part of the description and identification of the sheep.

This article is based on the knowledge which the informant Dánjal Jákup Mortensen, born at Øravík in 1921, has on the subject, and he is a reliable source with tremendous experience, because he has been a shepherd for more than fifty years in the village of Øravík, Suðuroy. The colours described in this article are his colours, i. e. the colours used in his village and which he has got from his forefathers who were also shepherds in the same village. Other shepherds in other villages have their own separate colour structures, names, and definitions which differ slightly or widely from the colour structure described in this article. Even within the vicinity of the village of Øravík the colour structures differ if only slightly.

In this survey all the colour combinations have been included which cover a reasonable and workable colour structure.

It would be wrong to conclude, however, that colours are the only system applied to the description and identification of the sheep. Other charateristics are being used, e. g. the shapes of the horns, the build of the sheep, and the character of the wool. In order to show the reader how the outfield stock is actually being described we have included a survey of the colour structure used in the village of Øravík where the informant was a shepherd and where his colour structure has been applied.

As an appendix the colour structure for the identification of geese has been added the way it has been used in Øravík. The colour structure of geese is also based on information supplied by Dánjal Jákup Mortensen.

### Inngangur

Tá ið hugsað verður um seyðin og týdningin, ið hann í farnum øldum hevur havt fyri føroyingar at lívbjarga sær í hesum landi, er sjálvandi, at røktin hevur verið týðandi táttur fyri at fáa sum mest burturúr. Tann ørgrynni av seyðalitum sum er, sigur sína søgu um henda týdning og røktina. Seyðalitirnir vóru ein liður, eitt amboð, í røktini.

Heimildarmaður til seyðalitirnar í hesum yvirliti, seyðaskipanina í Dalshaga (3 merkur) og gásalitirnar er Dánjal Jákup Mortensen í Øravík. Hann er føddur í 1921,

Fróðskaparrit 45. bók 1997: 5-23

sonur Jóan Petur Mortensen, bónda Úti í Garði. Dánjal Jákup fór heilt ungur at ganga burtur í haga við pápanum, sum var røktingarmaður og seyðamaður eins og fedrarnir høvdu verið har í bygdini.

Dánjal Jákup tók við eftir pápan sum seyðamaður í Dals- og Líðarhaga (6 merkur), og hevði hann síðan røktina í hondum, eisini saman við øðrum, til hann segði seyðamansskapin frá sær í 1988. Dals- og Líðarhagi hevur sum hinir hagarnir í Øravík verið í felag alt tað, ið menn vita um, og ikki í kenning. Seyðalitirnar hevur Dánjal Jákup allar eftir pápan, soleiðis sum hann hevði teir. Øravík er lítil bygd (12 merkur) og fólkið fáment, so hvør hevur rikið hjá øðrum. Litirnir í hesum yvirliti verða tí at skilja sum teir, ið brúktir hava verið í Øravík, tó at onkur frábregði kortini kunnu vera.

Seinnu árini, ið Dánjal Jákup var seyðamaður, arbeiddi og búði hann norðanfjørðs, men hann var suðuri í Øravík í lembing, í ullarroyting, og tá ið rikið varð um heystið, við hvørt eisini tá ið rikið varð eftir gimbrarlombum (tvæveturslombum). Hann var á hvørjum ári har suðuri um jólini og háveturin. Tey árini hann var norðanfyri, fór hann at skriva upp sumt, ið hevði við røktina at gera, at styðja minnið, t.d. lombini og litin á lombunum.

Í hetta yvirlitið eru tiknir við allir seyðalitir, sum Dánjal Jákup sjálvur nýtir. Hetta eru hansara litir og hansara litskipan.

Grundstøðið í litskipanini er øll tey ymisku orð og orðaliðir, sum einsamøll ella í skiftandi samansetingum verða nýtt til allar litir í skipanini. Tey eru: *hvítt, grátt, reytt, svart, dimm-, ljós-, mor-, smá-, snjó-, trí-, -litt, eplut, flekkut, gjørðut, grímut, gulmut, hjølmut, nevjut, skørvut, sokkut, øgnut, bak-, bein-, bóg-, drunn-, eyg-, fót-, fram-, háls-, herði-, høvuð-, kápu-, kraga-, lær-, múl-, nakka-, síðu-, skalla-, skort-, skó-, sneiði-, øsi-.*

Grundstøðið ger av, hvørjir og hvussu nógvir litir sum skilvíst og innan fyri rímiligt mark rúmast í litskipanini. Litskipanin er ein heild. Ikki ber altíð til at flyta litir úr einari litskipan yvir í aðra, uttan at heildin dettur sundur.

Tað, sum er sett í klombur í yvirlitinum, verður ikki roknað sum litur í hesari litskipanini. Ymsar orsakir, sum ikki verða gjølligari tilskilaðar her, kunnu vera til hetta, t.d. at soleiðis verður ikki sagt, ella at liturin ikki ber til í hesari litskipanini, ella at liturin verður lýstur á annan hátt. Men nøvnini í klombrum eru tikin við fyri betur at vísa, hvar ið markið gongur ímillum lit og ikki lit, og hvussu langt farast kann innan fyri »rímiligt« mark í hesari litskipanini. Onkustaðni stendur »sæst ikki« aftanfyri, og hetta verður tí her ikki roknað sum litur. Summi av nøvnunum í klombrum eru kortini seyðalitir í øðrum litskipanum.

Er seyður ikki einlittur, hevur hann bara ein og sama lit aftur at hvítum. Hvítt er altíð annar liturin. Grátt ella morreytt ella svart ella okkurt frábregði av hesum litum er so altíð hin liturin, eisini um seyðurin hevur ein ella fleiri leysar litir.

Er liturin fleiri orð, verður hann í summum førum nevndur frammanífrá á seyðinum og aftureftir, í øðrum førum verður størsti ella eyðkendasti liturin nevndur fyrst, og uppaftur í øðrum førum, hvussu

best fellur at siga litin. Orðaraðið kann eisini skifta, t.d. *fóthvítt skallahvítt* og *gulmut skallahvítt fóthvítt*. Ongar »rættar« reglur eru fyri orðaraðnum, men í summum av mest brúktu litunum er orðaraðið ofta fast, t.d. *eygsvart múlsvart herðisvart*. Í sjáldan brúktum litum er orðaraðið stundum hvørt um annað, og sum best ber til, eisini hjá sama manni. Fleiri orð liturin er, meira verða bara høvuðslitirnir, hvítt, grátt, morreytt og svart, brúktir og frábregðini minni.

Litirnir síggjast best á lambi. Sum seyðurin eldist, kámast litirnir, og teir koma meira saman í ullini, tykjast samanvaksnir. Men í ullarroyting eru teir upprunaligu litirnir aftur at síggja. Liturin, sum lambið hevur, verður ofta standandi, sjálvt um hann kann broytast nakað, sum seyðurin eldist.

Ymiskt er, hvussu litir eru at síggja, t. d. eru ljósgráir litir ofta ringir at síggja, síggjast kanska bara, um litirnir eru heldur stórir. Onkur heldur seg síggja litin í summum førum, onkur annar ikki. Her veldst stundum meira um, hvør ið sær. Litir kunnu liggja so tætt hvør upp at øðrum, at ilt kann vera at siga, hvør ið »rætti« liturin er. Markið er ikki altíð eintýtt.

Litirnir og litskipanin eru meira ella minni egin fyri hvønn seyðamannin sær ella fyri bygdina.

Aðrir seyðamenn hava sínar litir og sínar litskipanir, við fleiri ella færri litmøguleikum, alt eftir grundstøðinum. Orð og merkingar kunnu vera á muni. Sum dømi kann verða nevnt, at í grannabygdini Hovi eru *kleyvhvítt* og *høvuðhvítt* seyðalitir, og í aðrari grannabygd, Fámjin, eru *skjórut* og *huppahvítt* seyðalitir. Í Øravík er *kleyvhvítt* ikki seyðalitur, og *høvuðhvítt* verður bara sagt í samanseting, t.d. *hjølmut høvuðhvítt*. *Skjórut* verður bara sagt um gás, og *huppahvítt* bara sagt um neyt. Og í bygdini kann munur vera, t.d. sigur onkur ørvingur *eyglitt hálsut* um tað, sum í hesum yvirliti eitur *hálsut*.

Sum dømi um seyðalitir aðrastaðni kann verða víst til Robert Joensen: »Royvið«, Klaksvík 1958, og Janus Mohr:«Lív og lutir«, Hoyvík 1974.

Seyðalitirnir eru kortini ikki einasta amboð, sum kenningarmaðurin hevur, tá ið ræður um at kenna og lýsa seyðin, men hann brúkar ofta litirnar saman við øðrum frámerkjum, t.d. at ærin er hornut, knøvut, tjúkkvaksin, vambut, lágføtt, hábeint, síðullað, ullprúð, loðin, snøgg, doddut. Og hornini eru ymisk. Ærin kann hava rund horn, kantut horn, »gæjin« horn (víðhyrnt ella gleivhyrnt), ringut horn, ella hon kann vera nakkhyrnt.

Eitt yvirlit yvir seyðaskipanina í Dalshaga í 1979 er tikið við fyri at vísa, hvussu seyðurin í einum haga veruliga verður lýstur við litum og øðrum frámerkjum. Har sæst eisini, hvussu nógv er til av hvørjum liti. Ein mansaldur frammanundan var meira til av ljósum seyði í Øravík. Seinni hevur verið meira av dimmum seyði. Av morreyðum hevur altíð verið lítið til. Í Øravík varð sagt, at morreytt var óeydnislitur.

Fyrr í hesari øldini vórðu gæsnar avsagdar í øllum bygdum í Suðuroy uttan í Hovi og í Øravík, har ið gásahaldið hevur hildið fram eftir gomlum siði. Í Øravík skuldi hálv-



*Gamalt kyrringartippi undir Oyrnafjalli. Dánjal Jákup sæst niðast í tippinum.*
(An old enclosure in the outfield for taming sheep and making them accustomed to the place).

mørk undir gásina. Harafturat kundu hús, har ið eingin jørð var, hava eina gás »av bygdini«, sum tað varð nevnt. Tilsamans eini 30 gásafrælsi í bygdini. Roknað varð við sjey ungum upp á gásina eitt miðalár, so talið á gæsum við ungum var um hálvttriðja hundrað til trý hundrað. Gæsnar skuldu vera av bønum frá 25. mai til 25. oktober. Í Øravík var gásahagin í felag fyri alla bygdina. Mangan fóru gæsnar burtur av bygdini. So varð farið at leita, og tá vóru litirnir hentir. Somuleiðis tá ið gæs vórðu lýstar upp.

Gæsnar vóru markaðar. Á fótinum vóru markini riva og hol, í innfit og útfit, í høgra og vinstra fóti. Markini vórðu nevnd *riva innfit, riva útfit, hol í innfit, hol í útfit, riva hol í innfit, riva hol í útfit*. Á hvørjum fóti varð so lagt afturat, t.d. *riva innfit í høgra fóti*. Upp í tríggjar rivur og onkuntíð hol afturat kundu vera í somu fit. Summir markaðu eisini í veinginum, skóru eina ella fleiri fjaðrar. Okkurt hús í Øravík hevði markið: *riva innfit í høgra fóti og triðju fjøður í vinstra veingi.*

Um gásalitir aðrastaðni kann verða víst til Kristina Magnussen: »Gásarhald í Hovi«, Málting nr. 3, 1991, og áðurnevndu bók »Lív og lutir«, harafturat til greinarøðina »Gásin« eftir Ditlev Hammer í tíðarritinum »Suðuroyggin«, nr. 1, 1991, og framhald.

Seyðalitirnir og seyðaskipanin vórðu skrivað upp á vári í 1980, somuleiðis gásalitirnir. Tilfarið varð skipað í 1994 og inngangurin skrivaður. Helgi í Brekkunum, sum hevur verið røktingarmaður í Hósvík í mong ár,

var so beinasamur at lesa tilfarið og gera viðmerkingar. Hesir hava lisið handritið: Dánjal J. Bærentsen, gamli landsdjóralæknin, Dánjal Pauli Danielsen, bóndi í Búðini á Velbastað, og Jústines Olsen, djóralækni.

At enda skal verða lagt afturat, at Dánjal Jákup hevur sjálvur eftirkannað hetta handritið og váttar, at tað er í lagi.

## Seyðalitir

*hvítt*
*snjóhvítt* er serliga hvítt
*grátt*
*ljósgrátt*
(ikki dimmgrátt)
*morreytt*
*grámorreytt* aðrastaðni í landinum verður sagt ljósmorreytt.
(ikki ljósmorreytt)
(ikki dimmmorreytt)
*reytt*
*dimmreytt* er myrkareytt.
*svart*
*grásvart* svart lamb, ið gránar sum tilkomið. Grásvart verður ikki sagt um lamb. Grásvart sæst ikki, fyrr enn lambið verður gimbur.
*svart morlitt* svart lamb við brúnligum dámi, verður sum tilkomið grásvart.
*eplut* hvítur seyður við smáum svørtum plettum í skortinum. Eplut verður ikki nýtt í samanseting.
(ikki gráeplut)
(ikki moreplut)
*flekkut* hvítur seyður við svørtum litum
*dimmflekkut* hvítur seyður við stórum svørtum litum
*smáflekkut* hvítur seyður við smáum svørtum litum
*gráflekkut* hvítur seyður við gráum litum
*morflekkut* hvítur seyður við morreyðum litum
*reyðflekkut* hvítur seyður við reyðum litum
(ikki ljósflekkut)
(ikki grásvartflekkut)
*gjørðut* hvítur seyður, svartur um høvdið og ein leysan svartan lit mitt á bakinum
*dimmgjørðut* hvítur seyður, svartur um høvdið og ein stóran leysan svartan lit á bakinum
*grágjørðut* hvítur seyður, gráur um høvdið og ein leysan gráan lit mitt á bakinum
*dimmgrágjørðut* hvítur seyður, gráur um høvdið og ein stóran leysan gráan lit á bakinum
*morgjørðut* hvítur seyður, morreyður um høvdið og ein leysan morreyðan lit mitt á bakinum
*dimmmorgjørðut* hvítur seyður, morreyður um høvdið og ein stóran leysan morreyðan lit á bakinum
*reyðgjørðut* hvítur seyður, reyður um høvdið og ein leysan reyðan lit mitt á bakinum
*trígjørðut* hvítur seyður, svartur um høvdið og tveir leysar svartar litir á bakinum
(ikki grásvartgjørðut)
*grímut* svartur seyður við hvítum litum í skortinum
*grágrímut* gráur seyður við hvítum litum í skortinum
*morgrímut* morreyður seyður við hvítum litum í skortinum
*grásvartgrímut* grásvartur seyður við hvítum litum í skortinum
(ikki grímut grásvart)
(ikki ljósgrágrímut)
(ikki reyðgrímut)
*gulmut* svartur seyður, hvítur undir búkinum og upp undir halan
*grágulmut* gráur seyður, hvítur undir búkinum ...
*ljósgrágulmut* ljósgráur seyður, hvítur undir búkinum...
*morgulmut* morreyður seyður, hvítur undir búkinum ...
*grásvartgulmut* grásvartur seyður, hvítur undir búkinum ...
*gulmut grásvart* er tað sama sum grásvartgulmut
(ikki reyðgulmut)
*hjølmut* svartur seyður, hvítur um nøsina, skallan, halan og beinini (ikki altíð hvítur um øll beinini)
*gráhjølmut* gráur seyður, hvítur um nøsina ...
*morhjølmut* morreyður seyður, hvítur um nøsina ...
(ikki reyðhjølmut)
*nevjut* hvítur seyður, døkkur um nøsina og eyguni. Nevjut verður ikki nýtt í samanseting.
(ikki gránevjut)
(ikki mornevjut)
*skørvut* svartur seyður við smáum hvítum litum í síðunum (munur kann vera á litunum á báðum síðunum)
*ljósskørvut* svartur seyður við størri hvítum litum í síðunum ...
*gráskørvut* gráur seyður við smáum hvítum litum í síðunum ...
*ljósgráskørvut* gráur seyður við størri hvítum litum í síðunum ...
*morskørvut* morreyður seyður við smáum hvítum litum í síðunum ...
(ikki reyðskørvut)
*sokkut* ljósgráur seyður, dimmur um skortin, búkin og

beinini (gjarna øll beinini)
(ikki grásokkut, er tað sama sum sokkut)
(ikki morsokkut)
*reyðsokkut* reyður seyður, dimmur um skortin, búkin og beinini (gjarna øll beinini)
*øgnut* svartur seyður, við einkultum smáum hvítum litum í síðunum (litirnir kunnu vera fleiri í aðrari síðuni enn hinari)
*grátt øgnut* gráur seyður, við einkultum smáum hvítum litum í síðunum ...
*morreytt øgnut* morreyður seyður, við einkultum smáum hvítum litum í síðunum ...
(ikki reytt øgnut)
*bakgrátt* grátt aftur ímóti drunninum (allur framparturin gráur)
*bakmorreytt* morreytt aftur ímóti drunninum
*bakreytt* reytt aftur ímóti drunninum
*baksvart* svart aftur ímóti drunninum
(ikki bakhvítt)
*beinhvítt* svartur seyður, hvítur um beinini upp ímóti vaðhornunum (kann vera hvítur um øll beinini, men ofta bara afturbeinini)
*grátt beinhvítt* gráur seyður, hvítur um beinini ...
*ljósgrátt beinhvítt* ljósgráur seyður, hvítur um beinini ...
*morreytt beinhvítt* morreyður seyður, hvítur um beinini ...
*grámorreytt beinhvítt* grámorreyður seyður, hvítur um beinini ...
*reytt beinhvítt* reyður seyður, hvítur um beinini ...
*dimmreytt beinhvítt* dimmreyður seyður, hvítur um beinini ...
*grásvart beinhvítt* grásvartur seyður, hvítur um beinini ...
*reyðbeinut* reyður seyður, dimmreyður um beinini (næstan tað sama sum reyðsokkut)
*bóggrátt* hvítur seyður, størri gráan lit á bógnum
*bógmorreytt* hvítur seyður, størri morreyðan lit á bógnum
*bógsvart* hvítur seyður, størri svartan lit á bógnum
(ikki bógreytt, sæst ikki)
(ikki bóghvítt)
*bóglitt* hvítur seyður, ein lítlan (gráan, morreyðan ella svartan) lit á bógnum
*grátt bóglitt* gráur seyður, við lítlum hvítum liti á bógnum
*morreytt bóglitt* morreyður seyður, við lítlum hvítum liti á bógnum
*grásvart bóglitt* grásvartur seyður, við lítlum hvítum liti á bógnum
*svart bóglitt* svartur seyður, við lítlum hvítum liti á bógnum
(ikki ljósgrátt bóglitt, sæst ikki)
(ikki grámorreytt bóglitt, sæst ikki)
(ikki reytt bóglitt, sæst ikki)
*drunnlitt* hvítur seyður, lítlan (gráan, morreyðan ella svartan) lit á drunninum
*drunngrátt* hvítur seyður, gráur um drunnin
*drunnmorreytt* hvítur seyður, morreyður um drunnin
*drunnsvart* hvítur seyður, svartur um drunnin
*drunnhvítt* svartur seyður, hvítur um drunnin
*grátt drunnhvítt* gráur seyður, hvítur um drunnin
*ljósgrátt drunnhvítt* ljósgráur seyður, hvítur um drunnin
*morreytt drunnhvítt* morreyður seyður, hvítur um drunnin
*grámorreytt drunnhvítt* grámorreyður seyður, hvítur um drunnin
*grásvart drunnhvítt* grásvartur seyður, hvítur um drunnin
(ikki reytt drunnhvítt)
*eyglitt* hvítur seyður, lítlan (gráan, morreyðan ella svartan) lit um eyguni
*eyggrátt* hvítur seyður, størri gráan lit um eyguni
*eygmorreytt* hvítur seyður, størri morreyðan lit um eyguni
*eygreytt* hvítur seyður, størri reyðan lit um eyguni
*eygsvart* hvítur seyður, størri svartan lit um eyguni
(ikki eyghvítt)
*fóthvítt* svartur seyður, hvítur um kleyvarnar (kann vera hvítur um allar kleyvarnar, men mest afturkleyvarnar)
*grátt fóthvítt* gráur seyður, hvítur um kleyvarnar ...
*ljósgrátt fóthvítt* ljósgráur seyður, hvítur um kleyvarnar ...
*morreytt fóthvítt* morreyður seyður, hvítur um kleyvarnar ...
*grámorreytt fóthvítt* grámorreyður seyður, hvítur um kleyvarnar ...
*grásvart fóthvítt* grásvartur seyður, hvítur um kleyvarnar ...
(ikki reytt fóthvítt, sæst ikki)
*framgrátt* grátt um frampartin, hitt hvítt
*frammorreytt* morreytt um frampartin, hitt hvítt
*framreytt* reytt um frampartin, hitt hvítt
*framsvart* svart um frampartin, hitt hvítt
(ikki framhvítt)
*hálsut* hvítur seyður, svartur um hálsin
*gráhálsut* hvítur seyður, gráur um hálsin
*morhálsut* hvítur seyður, morreyður um hálsin

*reyðhálsut* hvítur seyður, reyður um hálsin
(ikki ljósgráhálsut)
(ikki grásvarthálsut)
(ikki hálshvítt)
*herðilitt* hvítur seyður, við lítlum (gráum, morreyðum ella svørtum) liti á herðini
*herðigrátt* hvítur seyður, við (størri) gráum liti á herðini
*herðimorreytt* hvítur seyður, við (størri) morreyðum liti á herðini
*herðisvart* hvítur seyður, við (størri) svørtum liti á herðini
(ikki herðireytt, sæst ikki)
(ikki herðihvítt)
*høvuðgrátt* hvítur seyður, gráur um høvdið
*høvuðmorreytt* hvítur seyður, morreyður um høvdið
*høvuðreytt* hvítur seyður, reyður um høvdið
*høvuðsvart* hvítur seyður, svartur um høvdið
*ljóst høvuðgrátt* hvítur seyður, ljósgráur um høvdið
(ikki høvuðhvítt einsamalt, men bara í samanseting)
*kápugrátt* hvítur seyður við gráari kápu
*kápumorreytt* hvítur seyður við morreyðari kápu
*kápureytt* hvítur seyður við reyðari kápu
*kápusvart* hvítur seyður við svartari kápu
(ikki kápuhvítt)
*kragahvítt* svartur seyður, hvítur undir øsini
*grátt kragahvítt* gráur seyður, hvítur undir øsini
*ljósgrátt kragahvítt* ljósgráur seyður, hvítur undir øsini
*morreytt kragahvítt* morreyður seyður, hvítur undir øsini
*grámorreytt kragahvítt* grámorreyður seyður, hvítur undir øsini
*grásvart kragahvítt* grásvartur seyður, hvítur undir øsini
(ikki reytt kragahvítt, sæst ikki)
*lærgrátt* hvítur seyður, gráur um lørini (kann eisini vera bara annað lærið)
*lærmorreytt* hvítur seyður, morreyður um lørini ...
*lærsvart* hvítur seyður, svartur um lørini ...
(ikki lærreytt, sæst ikki)
*lærhvítt* svartur seyður, hvítur um lørini ...
*grátt lærhvítt* gráur seyður, hvítur um lørini ...
*ljósgrátt lærhvítt* ljósgráur seyður, hvítur um lørini ...
*morreytt lærhvítt* morreyður seyður, hvítur um lørini ...
*grámorreytt lærhvítt* grámorreyður seyður, hvítur um lørini ...
*reytt lærhvítt* reyður seyður, hvítur um lørini ...
*grásvart lærhvítt* grásvartur seyður, hvítur um lørini ...
*múllitt* hvítur seyður, lítlan (gráan, morreyðan ella svartan) lit á múlanum
*múlgrátt* hvítur seyður, størri gráan lit á múlanum
*múlmorreytt* hvítur seyður, størri morreyðan lit á múlanum
*múlsvart* hvítur seyður, størri svartan lit á múlanum
(ikki múlreytt, sæst ikki)
(ikki múlhvítt)
*nakkareytt* hvítur seyður, reydligur í nakka
*grátt nakkareytt* gráur seyður, reydligur í nakka
*ljósgrátt nakkareytt* ljósgráur seyður, reydligur í nakka
(ikki morreytt nakkareytt)
*síðulitt* hvítur seyður, ein lítlan (gráan, morreyðan ella svartan) lit í síðunum (aðrari ella báðum síðunum)
*síðugrátt* hvítur seyður, størri gráan lit í síðunum ...
*síðumorreytt* hvítur seyður, størri morreyðan lit í síðunum ...
*síðusvart* hvítur seyður, størri svartan lit í síðunum ...
(ikki síðureytt, sæst ikki)
*síðuhvítt* svartur seyður, hvítan lit í síðunum ...
*grátt síðuhvítt* gráur seyður, hvítan lit í síðunum ...
*ljósgrátt síðuhvítt* ljósgráur seyður, hvítan lit í síðunum ...
*morreytt síðuhvítt* morreyður seyður, hvítan lit í síðunum ...
*grámorreytt síðuhvítt* grámorreyður seyður, hvítan lit í síðunum ...
*grásvart síðuhvítt* grásvartur seyður, hvítan lit í síðunum ...
(ikki reytt síðuhvítt, sæst ikki)
*skallahvítt* svartur seyður, hvítur um skallan
*grátt skallahvítt* gráur seyður, hvítur um skallan
*ljósgrátt skallahvítt* ljósgráur seyður, hvítur um skallan
(sæst bara, tá ið hvíti liturin er stórur)
*morreytt skallahvítt* morreyður seyður, hvítur um skallan
*grámorreytt skallahvítt* grámorreyður seyður, hvítur um skallan
*grásvart skallahvítt* grásvartur seyður, hvítur um skallan
(ikki reytt skallahvítt, sæst ikki)
*skortgrátt* hvítur seyður, gráur um skortin
*skortmorreytt* hvítur seyður, morreyður um skortin
*skortreytt* hvítur seyður, reyður um skortin
*skortsvart* hvítur seyður, svartur um skortin
(ikki skortlitt)
(ikki skorthvítt)
*skósvart* hvítur seyður, svartur um kleyvarnar
*skógrátt* hvítur seyður, gráur um kleyvarnar
*skómorreytt* hvítur seyður, morreyður um kleyvarnar
(ikki skóreytt, sæst ikki)
(ikki skóhvítt)

*sneiðihvítt* svartur seyður, hvítur oman eftir sneiðini
*grátt sneiðihvítt* gráur seyður, hvítur oman eftir sneiðini
*morreytt sneiðihvítt* morreyður seyður, hvítur oman eftir sneiðini
*reytt sneiðihvítt* reyður seyður, hvítur oman eftir sneiðini
*grásvart sneiðihvítt* grásvartur seyður, hvítur oman eftir sneiðini
(ikki ljósgrátt sneiðihvítt, sæst ikki)
(ikki grámorreytt sneiðihvítt, sæst ikki)
*øsihvítt* er tað sama sum kragahvítt

*gjørðut lærsvart*
*grágjørðut lærgrátt*
*morgjørðut lærmorreytt*
*gjørðut síðusvart*
*grágjørðut síðugrátt*
*morgjørðut síðumorreytt*
*gjørðut skallahvítt*
*grágjørðut skallahvítt*
*morgjørðut skallahvítt*
*gjørðut skósvart*
*grágjørðut skógrátt*
*morgjørðut skómorreytt*
*gjørðut sneiðihvítt*
*grágjørðut sneiðihvítt*
*morgjørðut sneiðihvítt*

*grímut kragahvítt* svartur seyður
*grágrímut kragahvítt* gráur seyður
*morgrímut kragahvítt* morreyður seyður
*grásvartgrímut kragahvítt* grásvartur seyður
*grímut skallahvítt*
*grágrímut skallahvítt*
*morgrímut skallahvítt*
*grásvartgrímut skallahvítt*
(ikki grímut beinhvítt)
(ikki grímut fóthvítt)
(ikki grímut lærhvítt)
(ikki grímut síðuhvítt)
(ikki grímut sneiðihvítt)

*gulmut beinhvítt*
*grágulmut beinhvítt*
*ljósgrágulmut beinhvítt*
*morgulmut beinhvítt*
*grásvartgulmut beinhvítt*
*gulmut fóthvítt*
*grágulmut fóthvítt*
*ljósgrágulmut fóthvítt*
*morgulmut fóthvítt*
*grásvartgulmut fóthvítt*
*gulmut kragahvítt*
*grágulmut kragahvítt*
*ljósgrágulmut kragahvítt*
*morgulmut kragahvítt*
*grásvartgulmut kragahvítt*
*gulmut skallahvítt*
*grágulmut skallahvítt*
*ljósgrágulmut skallahvítt*
*morgulmut skallahvítt*
*grásvartgulmut skallahvítt*
*gulmut skørvut*
*grágulmut skørvut*
*morgulmut skørvut*
(ikki gulmut sneiðihvítt)

*hjølmut høvuðhvítt*
*gráhjølmut høvuðhvítt*
*morhjølmut høvuðhvítt*
*hjølmut lærhvítt*
*gráhjølmut lærhvítt*
*morhjølmut lærhvítt*
*hjølmut síðuhvítt*
*gráhjølmut síðuhvítt*
*morhjølmut síðuhvítt*

*skørvut beinhvítt*
*gráskørvut beinhvítt*
*morskørvut beinhvítt*
*skørvut fóthvítt*
*gráskørvut fóthvítt*
*morskørvut fóthvítt*
*skørvut kragahvítt*
*gráskørvut kragahvítt*
*morskørvut kragahvítt*
*skørvut skallahvítt*
*gráskørvut skallahvítt*
*morskørvut skallahvítt*
(ikki skørvut sneiðihvítt)

*øgnut skallahvítt*
*grátt øgnut skallahvítt*
*morreytt øgnut skallahvítt*
(ikki øgnut sneiðihvítt)

*bakgrátt skallahvítt*
*bakmorreytt skallahvítt*
*baksvart skallahvítt*

*bakgrátt sneiðihvítt*
*bakmorreytt sneiðihvítt*
*baksvart sneiðihvítt*

*beinhvítt drunnhvítt*
*grátt beinhvítt drunnhvítt*
*ljósgrátt beinhvítt drunnhvítt*
*morreytt beinhvítt drunnhvítt*
*grámorreytt beinhvítt drunnhvítt*
*grásvart beinhvítt drunnhvítt*
*beinhvítt síðuhvítt*
*grátt beinhvítt síðuhvítt*
*ljósgrátt beinhvítt síðuhvítt*
*morreytt beinhvítt síðuhvítt*
*grámorreytt beinhvítt síðuhvítt*
*grásvart beinhvítt síðuhvítt*
*beinhvítt skallahvítt*
*grátt beinhvítt skallahvítt*
*ljósgrátt beinhvítt skallahvítt*
*morreytt beinhvítt skallahvítt*
*grámorreytt beinhvítt skallahvítt*
*grásvart beinhvítt skallahvítt*
(ikki beinhvítt sneiðihvítt)

*drunnhvítt síðuhvítt*
*grátt drunnhvítt síðuhvítt*
*ljósgrátt drunnhvítt síðuhvítt*
*morreytt drunnhvítt síðuhvítt*
*grámorreytt drunnhvítt síðuhvítt*
*grásvart drunnhvítt síðuhvítt*
*drunnhvítt skallahvítt*
*grátt drunnhvítt skallahvítt*
*ljósgrátt drunnhvítt skallahvítt*
*morreytt drunnhvítt skallahvítt*
*grámorreytt drunnhvítt skallahvítt*
*grásvart drunnhvítt skallahvítt*
*drunnhvítt sneiðihvítt*
*grátt drunnhvítt sneiðihvítt*
*ljósgrátt drunnhvítt sneiðihvítt*
*morreytt drunnhvítt sneiðihvítt*
*grámorreytt drunnhvítt sneiðihvítt*
*grásvart drunnhvítt sneiðihvítt*

*eyggrátt bóggrátt*
*eyggrátt drunngrátt*
*eyggrátt herðigrátt*
*eyggrátt lærgrátt*
*eyggrátt múlgrátt*
*eyggrátt síðugrátt*
*eyggrátt skógrátt*

*eygmorreytt bógmorreytt*
*eygmorreytt drunnmorreytt*
*eygmorreytt herðimorreytt*
*eygmorreytt lærmorreytt*
*eygmorreytt múlmorreytt*
*eygmorreytt síðumorreytt*
*eygmorreytt skómorreytt*
*eygsvart bógsvart*
*eygsvart drunnsvart*
*eygsvart herðisvart*
*eygsvart lærsvart*
*eygsvart múlsvart*
*eygsvart síðusvart*
*eygsvart skósvart*

*fóthvítt drunnhvítt*
*grátt fóthvítt drunnhvítt*
*ljósgrátt fóthvítt drunnhvítt*
*morreytt fóthvítt drunnhvítt*
*grámorreytt fóthvítt drunnhvítt*
*grásvart fóthvítt drunnhvítt*
*fóthvítt síðuhvítt*
*grátt fóthvítt síðuhvítt*
*ljósgrátt fóthvítt síðuhvítt*
*morreytt fóthvítt síðuhvítt*
*grámorreytt fóthvítt síðuhvítt*
*grásvart fóthvítt síðuhvítt*
*fóthvítt skallahvítt*
*grátt fóthvítt skallahvítt*
*ljósgrátt fóthvítt skallahvítt*
*morreytt fóthvítt skallahvítt*
*grámorreytt fóthvítt skallahvítt*
*grásvart fóthvítt skallahvítt*

*framgrátt drunngrátt*
*framgrátt lærgrátt*
*framgrátt skallahvítt*
*framgrátt skógrátt*
*framgrátt sneiðihvítt*
*frammorreytt drunnmorreytt*
*frammorreytt lærmorreytt*
*frammorreytt skallahvítt*
*frammorreytt skómorreytt*
*frammorreytt sneiðihvítt*
*framsvart drunnsvart*
*framsvart lærsvart*
*framsvart skallahvítt*
*framsvart skósvart*
*framsvart sneiðihvítt*
(ikki framsvart kragahvítt)

*hálsut bógsvart*
*hálsut drunnsvart*
*hálsut herðisvart*
*hálsut lærsvart*
*hálsut síðusvart*
*hálsut skósvart*
*hálsut sneiðihvítt*
*gráhálsut bóggrátt*
*gráhálsut drunngrátt*
*gráhálsut herðigrátt*
*gráhálsut lærgrátt*
*gráhálsut síðugrátt*
*gráhálsut skógrátt*
*gráhálsut sneiðihvítt*
*morhálsut bógmorreytt*
*morhálsut drunnmorreytt*
*morhálsut herðimorreytt*
*morhálsut lærmorreytt*
*morhálsut síðumorreytt*
*morhálsut skómorreytt*
*morhálsut sneiðihvítt*

*høvuðgrátt bóggrátt*
*høvuðgrátt drunngrátt*
*høvuðgrátt herðigrátt*
*høvuðgrátt lærgrátt*
*høvuðgrátt síðugrátt*
*høvuðgrátt skallahvítt*
*høvuðgrátt skógrátt*
*høvuðgrátt sneiðihvítt*
*høvuðmorreytt bógmorreytt*
*høvuðmorreytt drunnmorreytt*
*høvuðmorreytt herðimorreytt*
*høvuðmorreytt lærmorreytt*
*høvuðmorreytt síðumorreytt*
*høvuðmorreytt skallahvítt*
*høvuðmorreytt skómorreytt*
*høvuðmorreytt sneiðihvítt*
*høvuðreytt sneiðihvítt*
*høvuðsvart bógsvart*
*høvuðsvart drunnsvart*
*høvuðsvart herðisvart*
*høvuðsvart lærsvart*
*høvuðsvart síðusvart*
*høvuðsvart skallahvítt*
*høvuðsvart skósvart*
*høvuðsvart sneiðihvítt*

*kápugrátt drunngrátt*
*kápugrátt lærgrátt*
*kápugrátt skallahvítt*
*kápugrátt skógrátt*
*kápugrátt sneiðihvítt*
*kápumorreytt drunnmorreytt*
*kápumorreytt lærmorreytt*
*kápumorreytt skallahvítt*
*kápumorreytt skómorreytt*
*kápumorreytt sneiðihvítt*
*kápusvart drunnsvart*
*kápusvart lærsvart*
*kápusvart skallahvítt*
*kápusvart skósvart*
*kápusvart sneiðihvítt*

*kragahvítt beinhvítt*
*grátt kragahvítt beinhvítt*
*ljósgrátt kragahvítt beinhvítt*
*morreytt kragahvítt beinhvítt*
*grámorreytt kragahvítt beinhvítt*
*grásvart kragahvítt beinhvítt*
*kragahvítt drunnhvítt*
*grátt kragahvítt drunnhvítt*
